Um landnám Gríms Kambans í Føroyum.

Eftir Ólaf Halldórsson.

Í byrjan Føroyingasøgu verður sagt, at Grímur Kamban var fyrsti maður, ið bygdi Føroyar, og greitt verður frá í Flatoyarbók, (Gl. kgl. saml. 1005 fol.), tí handritinum, sum allar útgávurnar av søguni hava verið gjørdar eftir, at hetta fór fram á døgum Haralds kongs hárfagra.

Kortini sigur Landnámabók, at sonarsonur Gríms Kambans Þórólfr smjör, var farin við Hrafna-Flóka til Íslands, men henda ferðin var undan døgum Haralds hárfagra, og umframt hetta sigur Landnámabók, at bæði sonur og sonarsonur Þórólfs smjörs vóru millum teir menn, sum fyrstir settu seg niður í Íslandi, og eyðsæð er av hesum, at Grímur Kamban má hava verið langt undan døgum Haralds hárfagra. Tá so her aftrat kemur, sum menn vita, at norrønir menn hava bygt Føroyar um 800 ella stutt aftaná, er ikki at undrast á, at ymiskir vísindamenn hava illgrunast um tíðarrokning Føroyingasøgu. Eg skal her bert taka upp tað, sum Jørgen Steining sigur um hesi mál í grein um elstu søgu Føroya, ið prentað var í hinum stóra og stásiliga verkinum *Føroyar.*[1]) Í henni stendur hetta um frásøgnina í Føroyingasøgu um búseting Gríms Kambans í oyggjunum:

»Føroyingasøga nevnir *Grím Kamban* fyrsta norrøna landnámsmann í Føroyum og sigur frá, at tær vórðu bygdar á døgum *Haralds hárfagra;* men nú er *fyrst* at siga, at tað

---

[1]) *Føroyar I-II.* Útgivið hevur Dansk-Færøysk samfund . . . Keypmannahavn 1958.

er væl undirbygt, at orrustan í Havursfirði, sum gjørdi tað, at Haraldur fekk harravald, má verða flutt heilt fram til 900, hóast árið 872, sum vanliga verður nevnt, hóskar sera væl við landnámið í Íslandi 874, og *síðan* er at siga, at tíðarfestingin Føroyum viðvíkjandi, er heilt skeiv; tí abbasonur Gríms verður taldur millum fyrstu landnámsmenn Íslands, og tí mugu vit seta komu hansara til o. u. 825; hetta hevði eisini borið væl saman við frásøgu Dicuils«.[1])

Men nú er ikki »heilt skeivt« við tíðarfestingini í Føroyingasøgu í hesum føri, men har afturímóti við tekstinum í Flatoyarbókini.

Grímur Kamban er umrøddur í 1. kapitli í Føroyingasøgu. Finnur Jónsson, sum gav søguna út í Keypmannahavn 1927 við rannsakaðum teksti, ger í innganginum vart við, at Føroyingasøga í sínum varðveitta sniði er broytt og orð skotin inn í støðum. Hann sigur um 1. kapitul: »Der kan også være spörgsmål om, hvorvidt det 1. kap. ikke er en senere tilföjelse; . . . Kap. 2 begynder som om det var sagaens begyndelse.«[2])

Væl hevur spurningurin, um annaðhvørt 1. kapitul seinni er lagt aftrat ella hevur hoyrt til hina upprunaliga søguna, ikki avgerandi týdning í hesum sambandi, men ein roynd at finna eina loysn kann kortini verða gjørd.

Fyrra helvtin í Føroyingasøgu varð sett inn í hina longstu søguna um Ólav Tryggvason *(Óláfs saga Tryggvasonar en mesta*, her eftir stytt ÓlTr).[3]) Høvuðshandritið til hesa søgu er ÁM 61 fol.; tvey onnur handrit, sum her hava týdning, eru ÁM 62 fol. og Flatoyarbókin. 1. kapitul í Føroyinga-

---

[1]) *Føroyar*, bd. *I*, s. 171.

[2]) *Færeyingasaga*. Den islandske saga om Færingerne. På ny udgiven af Det kongelige nordiske Oldskriftselskab [ved Finnur Jónsson]. København 1927. Sjá *Indledning*, s. IX.

[3]) Útgivin í *Fornmanna sögur*, bd. I-III, Kaupmannahøfn, 1825–7, *Flateyarbók*, förste bind, [ved Guðbrandur Vigfússon og C. R. Unger]; Christiania 1860, og *Editiones Arnamagnæanæ*, Series A, Vol. 1–2, Hafniæ 1958–61 (Vol. 3 ikki enn útgivið).

søgu byrjar eins í øllum handritunum: »Maðr er nefndr Grímr kamban.«[1]) Síðani kemur í øllum handritunum uttan Flatoyarbókini ein ættartalva frá Grími Kambani til »Þorvarðar ok Ara, fǫður Guðmundar biskups.«[2]) Aftan á ættartalvuna kemur søgustubbin um, tá Grímur Kamban (og aðrir norðmenn) bygdu oyggjarnar, men síðani kemur ein stutt frásøgn um, at Auðr djúpúðga á veg úr Skotlandi til Íslands legði at í Føroyum og gifti her sonardóttur sína Óluvu; henda frásøgan er í Flatoyarbókini ætlandi skrivað eftir eini serstakari Føroyingasøgu, og ljóðar soleiðis (við regluskipaðari stavseting): »Auðr hin djúpauðga fór til Íslands ok kom við Færeyjar ok gipti þar Ólofu, dóttur Þorsteins rauðs, ok er þaðan kominn hinn mesti kynþáttr Færeyinga, er þeir kalla Gǫtuskeggja, er byggðu í Austrey.«[3]) Í Laxdœla sǫgu eru samlíkar upplýsingar og orðini »er þeir kalla Gǫtuskeggja« standa eisini.[4]) Hini varðveittu Landnámaskjølini hava afturímóti: »Þaðan eru Gǫtuskeggjar komnir.«[5]) Hetta vísir, at hóast ættartalvan var gjørd av høvundinum til ÓlTr eftir Sturlubók, ið er tað einasta Landnámaskjalið, ið menn vita hann hava kent og nýtt, eigur søgustubbin í Flatoyarbókini um Gøtuskeggjar ikki røtur sínar í henni, men í einum verki, ið hevur nýtt somu keldu um landnámið sum Laxdœla, eini keldu sum, eftir tí nakrir rannsóknarmenn ætla, var hin sama sum Ari hin fróði hevði skrivað upp um landnám;[6]) hetta verkið kann ikki vera annað enn Føroyingasøga, og tað kann tí sigast við vissu, at 1. kapitul hevur hoyrt til hina upprunaligu

---

1) *Editiones Arnamagnæanæ 2*, s. 31^{14}.

2) *Op. cit.*, s. 32^{3-4}.

3) *Flateyarbók I*, s. 122.

4) *Íslenzk fornrit, V.* bindi. Laxdœla saga. Reykjavík 1934. Sjá s. 8.

5) *Landnámabók I–III.* Hauksbók. Sturlubók. Melabók m.m. Udgiven af Det kongelige nordiske Oldskrift-selskab. København 1900. [ved Finnur Jónsson]. Sjá s. 37^{11} og 157^{31}.

6) Sjá *Íslenzk fornrit V*, s. XXXIX–XL, og Jón Jóhannesson, *Gerðir Landnámabókar*, Reykjavík 1941, s. 213–16.

søguna. Her kann verða lagt aftrat, at søgustubbin um Auðr djúpúðgu og Gøtuskeggjar ber eyðkenni av teimum pettunum í hinum varðveittu Landnámaskjølum, ið ætlast at vera úr hini elstu Landnámu.[1])

Flatoyarbókin og ÁM 62 fol. eru systurhandrit, soleiðis at tann, ið hevur skrivað Flatoyarbókina, hevur skrivað tað sama ÓlTr-handritið av, sum tann, ið skrivaði ÁM 62 fol. Maðurin, ið skrivað hevur felags upphavsritið at teimum báðum handritunum, hevur havt eitt merkiligt lyndi til at loypa einstøk orð um; hin frálíki skrivarin, sum skrivaði ÁM 62 fol., endurgevur upphavsrit sítt í tílíkum støðum aloftast orðaraðið, meðan skrivarin av Flatoyarbók hevur roynt at »rætta«. Eitt týðuligt dømi um hetta hava vit í 1. kapitli í Føroyingasøgu, áðrenn Flatoyarbókin skifti upphavsritið og fer at endurgeva hina serstøku Føroyingasøguna. Í ÓlTr (ÁM 61 fol.) stendur soleiðis: »Sva er sagt at Grimr kamban bygði fyrstr manna Færeyiar. En á dǫgum Haralldz ens harfagra flyðu fyrir hans ʀiki fiǫlði manna.«[2]) Í ÁM 62 fol. ljóðar hesin stubbin soleiðis: »Sva er sagt at Grimr kamban bygdi fyrst (*rættað frá* fyr) Færeyíar a dǫgum Haralldz ínns harfagra flydu fyrir hans ofʀiki fíoldi manna«. Tó at hesin teksturin ikki hevði verið aðrastaðni enn í ÁM 62 fol., hevði tað týðuliga sæst, at hann var avlagaður, okkurt mátti verið burturdottið. Hetta hevur tann, ið skrivaði Flatoyarbókina, verið varur við, og hann hevur roynt at rætta. Við tað at hann hevur lagt ættartalvuna burturúr, skrivar hann bert »hann bygde« í staðin fyri sum í hinum handritunum »Svá er sagt at Grímr kamban byggði;« annars rættar hann tekstin í upphavsritinum, soleiðis, at hann setir punktum aftan á *harfagra* og *þa* framman fyri *flydu;* tí er hesin tekstur komin: »hann bygde fystr Færeyiar a dǫgum Haralldz híns harfagra. þa flydu firir hans ofʀiki fíoldi manna,« og henda tekstin hava teir í

---

1) *Íslenzk fornrit V*, s. XL, og *Gerðir Landnámabókar*, s. 209.
2) *Editiones Arnamagnæanæ* 2, s, 32[4]–[6].

øllum prentaðu útgávunum heldur tikið enn hin eyðsæð rætta tekstin í ÁM 61 fol. Í útgávu Finns Jónssonar av Føroyingasøgu er høvuðsteksturin endurgivin eftir Flatoyarbókini, men tekstarfrábrigdi úr handritum við so ymsum orðaljóði, at prentaðir áttu at verið tveir – í einstøkum førum tríggir – javnsíðis tekstir. Úrslitið av starvshátti útgevarans verður ónýtiligur fóttekstur. Á hesum her viðgjørda staði kann tó av fóttekstinum gerast av, at teksturin í Flatoyarbókini er komin í, sum her er frágreitt.

Landnáma, sum vit nú hava hana, veit einki um, at Grímur Kamban búsettist í Føroyum, og tessvegna er tað lítið hugsandi, at nakað hevur staðið í hini elstu Landnámuni, ið kundi borið á tað borðið. Høvundur Føroyingasøgu kann kortini væl byggja á sanna søgn, serliga um hann – sum eg ætli – er ættaður frá Grími Kambani; hann hevur einki sagt um, nær búsetingin fór fram, men sum Jørgen Steining viðmerkir í nevndu grein, muga vit, vegna ættartalvur frá Grími Kambani, seta komu hansara til oyggjanna o. u. 825. Hvat ið tíðarfestingini viðvíkur, er tí einki, sum forðar fyri tí, at Føroyingasøga kann hava rætt.

SUMMARY

The editions of *Færeyinga saga* are all based on *Flateyarbók*. In the first chapter of the saga in that manuscript it is stated that Grímr *kamban* was the first man to settle in the Faroes, and that he settled there in the days of King Haraldr *hárfagri;* but from genealogies, in *Landnámabók* and elsewhere, it is clear that Grímr *kamban* lived long before the days of King Haraldr. Scholars have thus agreed that the dating of this first settlement in *Færeyinga saga* is wrong. Finnur Jónsson thought it doubtful that the first chapter of *Færeyinga saga* was original (*cf. Færeyingasaga*, Copenhagen 1927, p. ix), but from the relationship of the text to *Laxdœla saga* we may conclude that this first chapter is at least as old as the original version of the saga. The sentence referring to Grímr *kamban* and his settlement in the Faroes is in *Flateyarbók* taken from a manuscript of *Ólafs saga Tryggvasonar en mesta;* from the text of AM 62 fol., a sister manuscript to *Flateyarbók*, it can be

seen that the text of their common original was corrupt, and this has been corrected by the scribe of *Flateyarbók* to read: 'hann (*i. e.* Grímr *kamban*) bygde fystr Færeyiar a dǫgum Haralldz hins harfagra. þa flydu' *etc.* AM 61 fol., however, and other manuscripts which agree with it at this point, clearly preserve the text of *Færeyinga saga* intact: 'Sva er sagt at Grimr kamban bygði fyrstr manna Færeyiar. En a dǫgum Haralldz ens harfagra flyðu fyrir hans Riki fiǫlði manna.'

The settlement of Grímr *kamban* was thus not in fact assigned to a definite date in *Færeyinga saga*, and the author probably knew of this settlement from oral tradition.